# TÍÐINDI

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

# Vit verða væl móttikin

**Fólk smílast til okkara, og vit merkja ongar negativar reaktiónir, siga Rúna Hentze, nevndarlimur, og Kenneth Samuelsen, formaður fyri Starvsfólkafelagnum hjá Føroya Banka**

ARBEIÐSSTEÐGUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Myndir: Leo Poulsen*

Lagið var gott uttan fyri høvuðsdeildina í Føroya Banka við Húsagøtu seinnapartin í gjár.

Fitt av starvsfólki var savnað saman fyri at gera vart við teirra ónøgd um, at samráðingarnar millum Arbeiðsgevarafelagið fyri Fíggjarstovnar í Føroyum og Finansforbundet vóru slitnaðar.

Fólk hugnaðu sær eisini við pylsum og kaffi og tosaðu við tey, ið komu framvið. Og tey, sum duttu framvið, fingu eisini bjóðað bæði mat og drekka.

Í gjár stóðu starvsfólkini bert uttanfyri høvuðsskrivstovuna við Húsagøtu, men í dag hava tey víðkað tiltøkini til eisini at umfata stóru deildina í Niels Finsensgøtu, og í Gongini, har Trygd heldur til.

- Vit hava onga váttan fyri, at lønarhækkingin, sum AFF bjóðar, verður nøktandi fyri triðja og fjórða árið eisini. So vit hava onga trygd fyri, at vit ikki í veruleikanum fáa eina samlaða reallønarlækking í síðsta enda, og tað kunnu vit ikki góðtaka uttan víðari, segði Kenneth Samuelsen, sum er formaður í Starvsfólkafelagnum hjá Føroya Banka.

## Ganga í vaktum

Í morgun eru umboð fyri Starvsfólkafelagið hjá Føroya Banka og Finansforbundet farin til Suðuroyar fyri at hava kunnandi fund við starvsfólk hjá Føroya Banka har suðuri. Tann fundurin var í Øravík á middegi í dag.

Men tann stóri parturin, sum eftir er í Havn, stendur vakt á nevndu trimum støðum, og tey ganga í vaktum.

- Tað er skipað soleiðis fyri, at vit standa vakt í tríggjar tímar í senn, so verður vaktarskifti, sigur ein av teimum, ið tók fyrstu vaktina uttan fyri deildina í Niels Finsensgøtu í morgun.

Summi hava til uppgávu at gera kaffi, onnur ganga og mæla ímillum fyri at sýna sín stuðul. Men pylsur eru ikki at fáa í dag, eins og í gjár.

Tað gongur tó eisini uttan pylsur, og starvsfólkini dylja ikki fyri, at tey eru brynjað til tiltøk fleiri dagar fram.



*Vindeyguni verða í løtuni skift út í Føroya Banka. Kranin ger arbeiði fyri okkum, helt ein av vaktunum skemtandi fyri*



*Niels Joensen kom framvið deildini í N. Finsensgøtu. Men tað mundi neyvan verða fyri at stuðla tiltakinum hjá starvsfólkunum*



*Í gjár bjóðaði starvsfólkið í Føroya Banka sær sjálvum og øðrum sum komu framvið pylsur og kaffi*

Amerikansk lesandi í Føroyum:

# Verjir masterútbúgving í Nólsoy

**Randi Ward úr West Virginia hevur seinastu trý árini lisið á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya, og fríggjadagin fer hon at halda fyrilestur um høvuðsuppgávuna, sum hon fekk 11 fyri**

FYRILESTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Seinastu trý árini hevur Randi Ward úr West Virginia búð í Nólsoy, meðan hon hevur tikið masterútbúgving í mentanarvísindi á Søgu- og Samfelagsdeildini á Fróðskaparsetri Føroya.

Randi hevði eina bachelor útbúgving í antropologi og bókmentafrøði frá Ohio University í Athens, Ohio í USA, við sær til Føroya. Hon hevur nú tikið eina masterútbúgving, sum Fróðskaparsetrið hevur valt at kalla Masterútbúgving í Mentanarvísindi.

Høvuðsuppgávan er antropologisk lýsing av ævisøguni hjá Olevinu Joensen í Nólsoy. Gjøgnum samrøður um kvinnulív og kvinnuarbeiði og samstarvi í bygdalívinum, hevur Randi Ward varpað ljós á ein part av søguni, sum annars lítið hevur verið gjørt við.

Í námsskipanini, sum Fróðskaparsetrið hevur gjørt til Randi, verður ikki kravt, at hon verjir masterútbúgvingina, men hon fer kortini at halda ein almennan fyrilestur í Nólsoy fríggjadagin, har áhoyrarar eisini fáa høvið at seta fram spurningar viðvíkjandi uppgávuni.



*Randi Ward úr West Virginia búð í Nólsoy seinastu trý árini, meðan hon hevur lisið á Fróðskaðarsetri Føroya*

Annars kann nevnast, at próvdómarin frá lærda Íslendska Háskúlanum gav Randi Ward 11-tal við próvtøkuna.

Fyrilesturin verður fríggjakvøldið 25. mai kl. 19.30 í Royndarhúsinum. Áhugað á meginøkinum hava møguleika at koma til Nólsoyar við Rituni, sum siglir av Bursatanga kl. 19.00 og úr Nólsoy aftur kl. 22.25. Aftaná fyrilesturin verður móttøka.